## Dystirnir hetta vikuskiftið

### Hondbóltur

1. deild kvinnur
23.02 13.30 VB-VÍF
23.02 15.50 Sóljan-Stjørnan
24.02 14.30 Kyndil-Neistin

1. deild menn
23.02 16.00 H71-StÍF
24.02 16.00 Kyndil-Neistin
24.02 16.00 Tjaldur-KÍF

### Flogbóltur

Meistaradeild kvinnur
23.02 13.00 Mjølnir-Dráttur
23.02 15.00 Fleyr-TB
24.02 14.00 Dráttur-Fleyr

Meistaradeild menn
24.02 14.00 SÍ-ÍF
24.02 15.00 Mjølnir-Fram

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 6 | 6 - 0 - 0 | 536 | 312 | 224 | 24 |
| 2 | Stjørnan | 7 | 4 - 1 - 2 | 474 | 393 | 81 | 18 |
| 3 | Neistin | 7 | 4 - 1 - 2 | 421 | 371 | 50 | 17 |
| 4 | VB | 6 | 4 - 1 - 1 | 417 | 416 | 1 | 15 |
| 5 | StÍF | 6 | 2 - 0 - 4 | 339 | 422 | -83 | 5 |
| 6 | Kyndil | 7 | 0 - 1 - 6 | 426 | 508 | -82 | 4 |
| 7 | Sóljan | 7 | 1 - 0 - 6 | 345 | 536 | -191 | 4 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 7 | 7 - 0 - 0 | 571 | 472 | 99 | 25 |
| 2 | Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 559 | 473 | 86 | 18 |
| 3 | StÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 494 | 482 | 12 | 14 |
| 4 | Kyndil | 7 | 3 - 1 - 3 | 448 | 492 | -44 | 9 |
| 5 | H71 | 7 | 0 - 2 - 5 | 527 | 573 | -46 | 8 |
| 6 | Tjaldur | 6 | 2 - 0 - 4 | 455 | 511 | -56 | 8 |
| 7 | KÍF | 7 | 1 - 1 - 5 | 497 | 548 | -51 | 7 |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 13 | 12 | - | 1 | 37 | 10 | 27 | 17 |
| 2 | Mjølnir | 13 | 9 | - | 4 | 31 | 18 | 13 | 13 |
| 3 | ÍF | 14 | 5 | - | 9 | 23 | 32 | -9 | 7 |
| 4 | Dráttur | 13 | 5 | - | 8 | 24 | 28 | -4 | 6 |
| 5 | Fleyr | 13 | 2 | - | 11 | 9 | 36 | -27 | 3 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v | - | t | v sett | v sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fleyr | 14 | 10 | - | 4 | 35 | 22 | 13 | 15 |
| 2 | Fram | 14 | 9 | - | 5 | 33 | 24 | 9 | 12 |
| 3 | SÍ | 13 | 8 | - | 5 | 31 | 20 | 11 | 10 |
| 4 | ÍF | 13 | 3 | - | 10 | 16 | 35 | -19 | 6 |
| 5 | Mjølnir | 12 | 3 | - | 9 | 16 | 30 | -14 | 3 |

# Bæði FM-heitini kunnu avgerast

**Greiða oddastøðan hjá TB-kvinnunum ger, at tær longu í dag kunnu avgera meistaradeildina. So er kappingin harðari longri niðri á stigatalvuni, har liðini royna at fáa eina so góða endastøðu sum gjørligt**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Tað hevur staðið TB á øllum kappingarárinum hjá kvinnunum í ár, og í dag kunnu tær seta krúnuna á verkið og tryggja sær sítt fyrsta føroyameistaraheiti nakrantíð. Tað gera tær, um tær vinna í Havn móti Fleyr, og hevði tað borið til at vedda pengar um úrslitið, høvdu tey neyvan verið nógv sum høvdu torað at vedda ímóti at TB vinnur tann dystin.

Tað er oddaliðið móti botnliðnum, og sjálvt um Mjølnir kann koma upp á sama stigatal, hóast TB vinnur í dag, so skal sera nógv til hjá klaksvíkskvinnunum at koppa TB av fremsta plássinum. Til tað krevst ikki bert, at TB tapir sínar írestandi dystir — og tað er lítið hugsandi — og at Mjølnir vinnur allar sínar, men úrslitini skulu vera greið, tí sum nú er hevur TB eisini nógv betri settmun.

Tað líkist altso einum greiðum føroyameistara, sum fer á vøllin í Gundadalshøllini í dag, og tað er eisini ríkiliga uppiborið, tí Tvøroyri hevur átt tað besta liðið í vetur — síðst prógvað í steypafinaluni síðsta leygardag.

Við hesum í huga síggja hinir dystirnir í kappingini kanska ikki so áhugaverdir út, men teir verða avgerandi fyri raðfylgjuna longri niðri á stigatalvuni. Dráttur hevur tveir dystir hetta vikuskiftið. Tann fyrri er í dag móti Mjølni í Klaksvík, og hin er í morgin á heimavølli móti Fleyr, sum sostatt eisini hevur tvær uppgávur hetta vikuskiftið. Dráttur liggur enn væl fyri í kappingini um bronsuna, og tað verður ivaleyst henni, sum vágakvinnurnar nú fara at stíla eftir. Ein heimasigur móti Fleyr skuldi ikki verið ógjørligt, men útidysturin móti Mjølni sær nakað truplari út. Drátturkvinnurnar kunnu vóna, at Mjølnir hevur mist hugin eftir taptu steypafinaluna (og landskappingina). Silvurplássið hjá mjølnirkvinnunum er heldur ikki í vanda, so tær hava ikki so nógv annað enn æruna eftir at spæla um. Men munnu tær ikki fara at gloyma alt um tað, so skjótt dysturin byrjar?

### SÍ og Fram mugu vinna

Hjá monnunum hava Fram og SÍ enn ein møguleika fyri at taka Fleyr aftur, men tað sær ikki lætt út. Sørvingar vunnu steypafinaluna, og hon er eitt gott plástur á sárið, nú teir mestsum hava mist FM-møguleikan. SÍ hevur enn ein heimadyst eftir móti Fleyr, og vinna teir hann umframt dystin í morgin móti ÍF og útsetta dystin móti Mjølni, fara teir framum havnarliðið. Men so mugu teir líta á, at Mjølnir í tí allarsíðsta dystinum koppar Fleyr í Havn, og við allari virðing fyri Mjølni, so er tað ikki serliga sannlíkt, at so verður.

Fuglfirðingar hava ikki tað stóra eftir at stríðast um, og síðstu dystirnir kunnu hóskandi brúkast sum eitt slag av fyrireiking til næsta ár. Teir kunnu sjálvandi satsa uppá at fáa hevnd fyri steypafinalutapið síðsta leygardag, men meir enn tað fáa teir so ikki.

Fram hevur eins og SÍ framvegis ein lítlan FM-møguleika at spæla fyri, men eins og sørvingar skulu teir hava góða hjálp frá øðrum liðum, um gullið skal enda í Eysturskúlanum í ár. Útidysturin móti Mjølni ber væl til at vinna, men spurningurin er hvussu stóra trúgv teir í Fram enn hava uppá FM. Fyri Mjølnir ræður um at vinna, um teir skulu sleppa undan at enda niðast í kappingini. Tað ger kanska, at teir eru meira tendraðir enn Fram, og tað kann sjálvandi fáa stóran týdning.

Fleyr spælir ikki hetta vikuskiftið, og tí er setningurin hjá SÍ og Fram púra greiður: Dystirnir í morgin skulu vinnast, ella er føroyameistaraheitið endaliga fokið. Nakað annað er so, at um tað óvæntaða skuldi hent, at bæði SÍ og Fram tapa í morgin, ja so er Fleyr við 100% vissu føroyameistari, sjálvt um teir ikki sjálvir skulu í dyst fyrr enn um eina viku.



*Vinnur TB dystin móti Fleyr um vikuskiftið, er FM-heitið - og harvið næsta gullmerkið innan níggju dagar - heima*

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Asta Petrauskiene | Sóljan | 162 | (25) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 155 | (46) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 136 | (58) |
| Ioana Rápa | VÍF | 134 | (31) |
| Gabriella Fekete | VB | 109 | (27) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 99 | (17) |
| Regina Radó | VB | 98 | (24) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 97 | (14) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 92 | (37) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 89 | (7) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 87 | (16) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 83 | (1) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 76 | (4) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 73 | (9) |
| Alina Olaru | StÍF | 72 | (9) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bjarni Wardum | H71 | 135 | (32) |
| Heini Joensen | Neistin | 127 | (38) |
| Høgni Klein | Kyndil | 117 | (10) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 115 | (15) |
| Finnur Hansson | H71 | 110 | (22) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 109 | (32) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 107 | (12) |
| Sámal Joensen | VÍF | 104 | (14) |
| Ingi Olsen | VÍF | 103 | (11) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 102 | |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 97 | (14) |
| Iljan Topic | KÍF | 93 | |
| Durica Tomic | KÍF | 93 | (24) |
| Artur Johansen | StÍF | 91 | (11) |
| Áki Olsen | VÍF | 83 | (11) |

Vikuskifti

Nr. 38 • leygardagur • 23. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Rein komedia



Lesið á síðu 3



# Altíð tikið fløskuna fram um míni børn

- Einki er at ivast í, at míni børn hava tikið skaða av mínum drekkaríi. Hyggi eg at myndum av teimum, tá ið tey vóru lítil, síggi eg eitt tómt úttrykk í eygunum. Sum um tey umbera seg fyri at vera til, og tað er ómetaliga hart hjá mær at síggja, sigur 30 ára gamla Anna, sum hevur fótað sær aftur í lívinum eftir at hava drukkið í nærum 20 ár

Lesið síðu 4 og 5

## Sýtti fyri hjálp og fekk váta grøv



Rógvi Johansen, sum flest okkara kenna sum súkklara í serflokki, var við minniliga túrin fyri júst 20 árum síðani, tá ið Sigurfarið úr Klaksvík royndi at bjarga russum í havsneyð

Lesið síðu 6 og 7

## Tjóðskaparkenslur og tjóðarbygging



Politikarar og fjølmiðlar hava vant føroyska fólkið við, at alt er politikkur, somuleiðis, at tjóðskapur og politikur eru tað sama. Men so er ikki, tað er bráðneyðugt at kunna tosa frítt um hesi viðurskifti, uttan at skula uppliva henda ógvusliga misskilta sensur, skrivar Kim Simonsen

Lesið síðu 9 og 10